# Kjak



**Jenis av Rana**
*Formaður Miðfloksins, ein flokkur við hugsjónum*

- ein viðmerking til Høgna Hoydal

## Spell at Lene Espersen ikki er íslendingur

Neyvan var viðmerking Vágaportalsins um døgverðan í Kirkjubø lisin, tá formaður Tjóðveldsins sá sær ein tjans at styrkja støðu sína innanfloks. Hesaferð gjørdist undirritaði offrið. Uttan at spyrja langar hann til, skilir ikki, at eg vági mær at hava aðra hugsan um homosexuella atferð enn hann.

Tjóðveldishetjan øtast, hugsið tykkum, Jenis ætlar sjálvur gera av, um hann fer til borðs í Kirkjubø.

Tá Høgni skrivaði bræv sítt og sendi tað í eyst og vest, suður og norð, vóru júst 5 dagar farnir, síðani sama hetja noktaði at eta máltíð saman við danska uttanríkisráðharranum, sum bjóðaði honum, mær o.ø. til máltíð hjá Ríkisumboðnum. Høgni var »súrur« inn á Lenu, hon loyvdi sær at harta hann, afturfyri kundi hon eta einsmøll! Einsamøll varð hon tó ikki, vit vóru har, øll uttan Høgni, sum nú bráddliga ikki skilir, at man ikki treytaleyst vil til borðs. Men stólur hansara stóð tómur, og lundabringan, laksurin, og annað gott á borðiski hansara gløddi at okkum, meðan prát og át gekk so listiliga.

Men sjálvandi, Lene er ikki íslendingur, men dani, og eigur, sambært Høgna, ikki at siga honum ímóti, tí hon er gestur í Føroyum.



**Thomas Juul Askham**

## Er tað neyðugt at hanga alt út á snórarnar???

Útvarpið og Sjónvarpið bóru tíðindi um ein starvsfelaga hjá teimum, sum var burturvístur úr starvi sínum vegna fíggjarundandrátt, her skal ikki viðgerast sjálvt málið.

Ein situr eftir við nøkrum spurningum?

Var tað so alneyðugt at boða øllum Føroya fólki frá hesum?

Verður tað als ikki hugsa um ta familju taðð rakar?

Hvar gongur markið hjá fjølmiðlum og fjølmiðlafólki, tá talan er um hendingar, sum hava tað við sær, at tær hava daprar ringvirkningar fyri familjuna tað rakar?

Hvat kunnu tær almennu Føroyar gera og brúka hesi tíðindi til?

Ræður tað bert um hjartaleyst/kensluleyst at borðreiða við týðindum, sum draga fólkasálina niður, tí langt er millum tey mótsættu tíðindini?

Ein álvarsamur spurningur stendur eftir:

Var tað neyðugt hjá kringvarpstjóranum og leiðsluni at boða Føroya fólki frá hesum, sum hent var á stovninum?

Var hettar ikki bert at leggja stein oman á byrðu?



**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður*

## Fjølmiðlar

Fjømiðlar eru sjálvsagt ekspertar at flyta tíðindaflutningin, soleiðis at onkur skal blíva svartiper, sannleikarnir hava minni at siga.

Stórar yvirskriftir standa í bløðunum, til dømis hevði eitt blað alla forsíðuna, har stóð »løgtingsfólk vilja ikki niður í løn«. Har var ein kolasvørt lygn, tí eg havi sagt mína hjartans meining um tað, at skulu onnur í samfelagnum niður í løn so skulu vit eisini.

### Síðan døgurðin í Kirkjubø

Har verði eg dúgliga citeraður fyri alt millum himmal og jørð, sjálvt í íslendskum miðlum verði eg citeraður saman við stórari mynd, teir vilja so gjarna draga Gerhard inn í henda almenna døgurðan, sum eg ikki varð boðin til.

Norðlýsið hevur ymiskt, sum eg havi sagt, men sum eg í verðuleikanum ikki segði. Eg vanvirði ongan, hvørki Johannu Sigurðardóttir ella nakran annan. Men vísti ferð eftir ferð á, at eg ikki var boðin til henda, eftir hondini nógv umtalaða døgurðan, so tað var ikki mín trupulleiki.

Men álíkavæl...

### Øll kenna

Øll kenna mína støðu við 266B, samkynd og alt tað.

Eg havi skrivað nógvar greinir og á tingsins røðarapalli havi eg sagt mítt. Tá menn og menn sleppa giftast og kvinnur og kvinnur, tá er okkara land sokkið djúpt og minnur um »Sodoma og Gomorra«.

So tað skal ikki misskiljast, tað fer Gerhard altíð at kempa ímóti, so kunnu fólk skíra meg fyri at vera gamaldags.

### Gestablídni

Bíblian skrivar í Lukasa evangelii kap. 19, vers 5 og 6: Og tá ið Jesus kom hagar, leit hann upp og bar eyga við hann! Sakeus skunda tær og kom niður, tí í dag má eg koma at gista í húsi tínum.

Og Sakeus skundaði sær og fór niður og tók ímóti Honum glaður.

So út frá skriftini eigi eg at kunna sita til borðs við øllum, eisini íslendska forsetisráðharranum uttan nakað, men eg nýtist hvørki at vera samdur við henni ei heldur góðtaka hennara holdningar.

Men miðlarnir vera altíð teir sterku, men vælsignaðir ikki misnýta tykkara vald.



**Oddvør Johansen**

## Bussleiðin

Sum stórforbrúkari av Bussleiðini í Tórshavn, skrivi eg hesar reglur.

Hon er sera hent. Bussleiðin. Vit, (sum longu í sjeytiárunum gjørdu av at velja bilin frá), fáa illa dagin at hanga saman uttan Bussleiðina.

Og Tórshavnar býráð vil hava fólk at »seta bilin«. Bussleiðin er av somu orsøk ókeypis - eitt lekkurt luxus. Kortini tora fólk ikki at seta bilin av álvara, Havnin er vorðin ein sera spjaddur býur og langt er at ganga. Tí er Bussleiðin so hent.

Í Havn eru nógvir borgarar, hvørs einasta álit fyri flutningi er Bussleiðin. Í býnum eru 2757 fólk yvir 65 ár, og bara í barnaskúlunum ganga 3363 børn. Øll hesi - (saman við 2278 barnagarðsbørnum, fleiri miðnámsskúlum, arbeiðsfólki og teimum, ið ikki hava bil) - eru stórforbrúkarar av Bussleiðini.

Í løtuni er Tórshavnar býráð við at leggja nýggjan leist fyri hesa leið, og vit frætta, at nú fer kanska at verða koyrt tvær ferðir um tíman í staðin fyri tríggjar ferðir. Um kvøldið verður koyrt eina ferð um tíman.

Hetta kunnu vit ikki gera nakað við, mugu liva við tí, vit fáa jú tænastuna ókeypis. Í staðin gjalda vit tann prís, at í vikuskiftunum steðgar Bussleiðin upp.

Tey, ið skipa fyri Bussleiðini, mugu skilja, at eingin fer at seta bil sín av álvara, um Bussleiðin liggur still í vikuskiftunum. Støðan nú er, at einsamøll foreldur og mong eldri fólk, ið ikki longur koyra bil, mugu leiga sær bil í kirkju/samkomu, til hugnakvøld í familju, til konsertir og onnur tiltøk, sum skapa trivna og ríka tilveruna. Tað kostar smáar kr. 200 tur/retur, og hetta hevur einki at týða fyri fólk, sum hava pengar. Hvat gera øll hini? Vit kunnu gita sjálvi.

Eitt boð er, at allir brúkarar frá 11-100 ár keypa eitt mánanskort og at stempulkortini verða skrottað fyri alla tíð. Institutiónir sum barnagarðar og skúlar fáa serlig kort, og ferðafólk koyra ókeypis. Síðan koyrir Bussleiðin allar dagar í viku, og hetta fer møguliga at hava við sær, at alt fleiri fólk »seta bilin«.

Tað er ein serligur lívsstílur, men tað ber til.